Kirstin Helgadóttir (1987)
*Triton*, 2026

Maskinbroderað tekstilkollaga
Ogn: Miðnámsskúlin á Kambsdali

*Tilgongd*

Formatið og staðsetingin av verkinum er ein tilvísing til klassisku frísurnar, ið ofta eru at síggja í gomlum søguligum bygningum. Fyrstu frásøgnirnar um vesturlendska sivilisatión og demokrati byrjaðu sum frísur í eitt nú gamla Grikkalandi. Hesar vóru oftast úr steini og vóru at síggja í bygningum við ávísari tygn, eittnú universitetum og templum.

Hendan frísan er ikki úr steini, men úr tekstili. Løriftstoyið kemur frá nýnýtsluverkstovuni hjá Bláa Krossi og blindrammurnar eru somuleiðis gjørdar úr endurnýttum tilfari. Formatið og val av tilfari bendir á, at verkið er ein nýtulking av frísuni. Heldur enn at staðfesta sannleikar og virðisgrundarlag, so er hetta ein frísa um tvísemi og leitanini eftir støðufesti í flótandi moderniteti. Heimsveldið er av, og ein nýggjur veruleiki valdar.

Súlurnar, ið eyðkenna nýggja útbygningin, standa sterkar báðu megin inngongdina, og innramma verkið. Súlurnar hava tveir ymiskar litir, og hesir ganga aftur í litinum á tekstilinum. Verkið er samansett av løriftum, har linjutekningar eru broderaðar á toy við broderingsmaskinuni á Fablab her á skúlanum (takk Jóannes og Tóra). Maskinan verður vanliga brúkt til at brodera smærri motivir á klæði, so sum búmerkir. Størsta formatið, ið kann broderast, er 20 x 20 cm. Hetta merkir tískil, at hvørt lørift er samansett av fleiri broderingum. Maskinan er neyvan ætlað til slíkt stórarbeiði, og tí er hetta ein roynd at spæla við ta tøkni, ið er tøk á skúlanum, og at royna at brúka hana á ein nýggjan óvanligan hátt, og á tann hátt skapa samljóð millum verk og umhvørvi.

Tilgongdin at skapa verkið hevur verið sum at skapa eitt slag av imprinti. Innihaldsliga havi eg savnað tilfar frá skúlanum og bygdunum kring skúlan. Skitsur av umhvørvinum, sprekkurnar í gólvinum, tekningar á veggjunum, búmerkir frá kontainarum, myndir úr lærubókum osfr. Øll tey innsavnaðu inntrykkini havi eg síðan koyrt gjøgnum eina talgilda kvørn, ið hevur trimmað tilfarið til linjutekningar, har bæði tekstur, abstrakt mynstur og søguligar tilsipingar skapa eitt samanhangandi net. Eg havi broderað myndirnar so hvørt og havi síðan sett tey ymisku løriftini saman sum eina kollagu. Hetta er helst eitt slag av hybridverki, ið kann bólkast sum bæði kollaga og maskinbroderað tekstilverk.

*Hvat sigur verkið okkum?*

Verkið er sum ein fløkja. Sum eitt putlispæl, ið ikki liggur heilt rætt. Vit síggja eina abstrakt ímyndaða verð, har tað ítøkiliga er vovið saman við tí óítøkiliga. Tað naiva saman við tí abstrakta. Ein støðugt skiftandi frásøgn, ið roynir at renna saman í eina samanhangandi heild uttan heilt at geva meining.

Ein flutningskontainari í Fuglafirði var startskotið til verkið. Niðri á kaiøkinum standa bingjur, og á nógvum teirra eru prentað búmerkir, ið hava tikið íblástur úr griskari gudalæru. Triton kontainarin vakti mín ans.

Triton er sonur havgudin Poseidon, sum er ein av teimum 12 olympisku gudunum. Í mótsetning til pápa sín, ið er ein fullvaksin menniskjamaður, so er Triton ungur og eitt slag av hybridveru, ið er hálvt menniskja og hálvur fiskur. Hann er kendur fyri at vera boðberi og brúkar eina gággu sum horn. Hann brúkar hornið til at sissa ella øsa aldurnar á sjónum.

Triton er mitt millum tveir heimar, sum ger hann til eina góða mynd av ungdómi. Eitt tíðarskeið, har ein ikki longur er barn, men heldur ikki heilt vaksin. Kropsliga samansetingin hjá Triton vísir somuleiðis á, at menning ikki snýr seg um at tveita burtur og gerast nakað annað, men heldur um at sameina ymiskar partar av sær sjálvum—fortíð og nútíð, veikleika og styrki. At gerast vaksin er tí ikki statiskt, men ein skiftandi javnvág millum tað tama og tað villa. Verkið *Triton* sameinir ymiskar samleikar í eina fjølbroytta heild. Tað naiva og spælandi verður sett saman við tí kompleksa og abstrakta. Tað er hetta tvísemi, ið er kjarnan í verkinum.

Tað er somuleiðis eitt afturvendandi tvísemi í frásagnum frá miðøldini. Hybridverur, ið eru bæði djór og menniskja. Menniskju royndu tá at skilja seg frá skrímslum, men kendu seg samstundis fløkt saman við tí fremmanda. Hugtakandi við miðøldini er, at menniskja var tá ikki í sentrum, eins og í dag. Menniskja var ein kosmisk vera, á føti við aðrar verur, sum deildi kropp við djórini og sál við andarnar – ein posthumanistiskur tanki, ið tá var givin. Verkið *Triton* ynskir at minna okkum á, at vit menniskju eru ein partur av einum neti av verum. At vit deila kropp við djórini. At alt tað, sum vit skapa, er náttúra. At háhús eru eins nógv náttúra sum trøini. At internetið er eins nógv náttúra sum eiturkoppavevið. At náttúran ikki er uttanfyri, men heldur inni í okkum.

At gerast vaksin snýr seg um at læra at blása í egið horn. At finna sína rødd og sín sannleika, ið rúmar øllum tvíleika. Kubbarnir kunnu vendast og snarast, til myndin gevur meining. Hetta er tó ein lívslong leitan. So hvørt vit læra og víðka okkara sjónarhorn, broytist okkara perspektiv. Sannleikin er flótandi, og somuleiðis er menniskja ein hybrid vera, ið støðugt broytir skap, alt eftir umstøðum og samanhangi.


Triton
Anthropomorf
Tvileikur
Posthumanisma
ELSKA
CRONOS
TRITON